Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

## Skúlastjóri í Stranda skúla (endurlýsing)

### Starvið sum skúlastjóri í Stranda Skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. apríl 2008

Í Stranda Skúla eru 196 næmingar í 1. – 10. fl., og 22 lærarar starvast í skúlanum.

**Høvuðsuppgávur skúlastjórans eru**
- at standa á odda fyri framhaldandi menning á námsfrøðiliga og fyrisitingarliga økinum
- at fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Harumframt skal stjórin seta í verk**
- menningarætlan fyri skúlan
- ítøkiligar broytingar samsvarandi visjón Mentamálaráðsins
- eina HR-ætlan fyri skúlan

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi starv við nógvum ymiskum uppgávum. Góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning, og tú fert at taka lut í leiðsluútbúgving, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving, hava nomið ella nema sær góðkenda leiðsluútbúgving og hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.
Harumframt er tað ein fyrimunur, at umsøkjarar hava
- leiðsluroyndir frá almenna- ella privata arbeiðsmarknaðinum
- góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- áhuga fyri avbjóðingum
- góðan málførleika, serliga í føroyskum, norðurlendskum og enskum

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Stranda skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið verður lønt í lønarflokki 34.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, og er lønin pr. 1. august 2006 kr. 31.429,66 umframt eina mánaðarliga viðbót á kr. 700,00. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 4. mars 2008.

Umsóknin verður stílað til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Lýsingin er eisini á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv).

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355050

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.


Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við



DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

Felgutilboð



18" BMW New 3
Við 225/40-18 dekkum
Original-look felgur til BMW 3-røðina við 225/40-18 dekkum. Felgurnar verða latnar við boltum og BMW-búmerkjum.
Fyri settið 9.990,-



18" New RS4
Við 225/40-18 dekkum
Original-look felgur til VW/Audi við 225/40-18 dekkum. Felgurnar verða latnar við boltum og VW/Audi-búmerkjum.
Fyri settið 10.800,-



Razor Black 18"
Við summardekkum
Flott 18" felga. Svartlakkerað við poleraðum, breiðum kanti.
Á goymslu til VW/Audi, Seat, Skoda
Fyri settið 9.990,-



Boston 19"
Við summardekkum
Sera flott felga í hypersilver.
Á goymslu í 5x112 til VW, Audi, Seat.
Fyri settið 12.900,-



Baby Lite barnasetur
Flott barnasetur til børn í aldrinum 0-9 mðr.
einans 999,-



einans 2.590,-
Aytobe PG-63509 GPS
Aytobe GPS við fullfíggjaðum korti yvir Vestureuropa fyri sera lágan prís. Europakortið er á einum 2GB SD korti. Alt er Plug and Play.

www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · tel 227 000